# Demokratiskt at sýta staðfesting

**Íslendski forsetin heldur, at hann hevur ikki gjørt annað enn at halda seg til góða, evropeiska siðvenju**

ÍSLAND
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Ólafur Ragnar Grímsson, forseti, verjir avgerð sína at sýta fyri at staðfesta Icesave-lógina við, at tað var demokratiskt. Hann sigur, at um alt Evropa eru lond, sum hava álit á sínum fólki við at brúka fólkaatkvøður, tá týðandi avgerðir skulu takast.

- Eg havi ikki gjørt annað enn at halda eina góða evropeiska siðvenju at lata fólkið taka ta endaligu avgerðina, sigur forsetin við BBC og leggur afturat:

- Eg helt, at tað nýggja Evropa, sum vit tosa um, snýr seg ikki bara um marknaðarnýskipanir, men eisini um demokrati og fólksins vilja.

Ólafur Ragnar Grímsson tykist ikki vera ørkymlaður av, at Bretland og ES-nevndin hava ávarað um, at tað kann fáa avleiðingar fyri íslendsku umsóknina um ES-limaskap, um fólkaatkvøðan vrakar Icesave-lógina.

– Kjakið við ES taka vit í komandi árum, sigur hann við BBC.



*Ólafur Ragnar Grímsson: – Eg havi bara hildið meg til góða siðvenju*

*Mynd: Morgunblaðið*

# Jóhanna sat við telefonina

**Íslendska stjórnin hevur roynt at sissa bretar, niðurlendingar og onnr um, at tey fáa sínar pengar**

ÍSLAND
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Íslendski forsætisráðharrin, Jóhanna Sigurðardóttir, hevði úr at gera í gjár við at vissa onnur lond um, at Ísland fer at halda sínar fíggjarligu skyldur mótvegis umheiminum, hóast forsetin sýtti fyri at staðfesta Icesave-lógina.

Millum annað tosaði Jóhanna Sigurðardóttir við bretska forsætisráðharran, Gordon Brown, niðurlendska forsætisráðharran, Jan Peter Belkemende, og norska forsætisráðharran, Jens Stoltenberg.

Tað var ikki bara forsætisráðharrin, sum hevði telefonsamband við sínar starvsfelagar uttanlands. Eitt nú tosaði, uttanríkisráðharri, eisini við sín bretska starvsbróður, David Miliband, um Icesave-málið.

Herumframt skal stjórnin eisini hava samband við Altjóða Gjaldoyragrunnin IMF um støðuna.



*Jóhanna Sigurðardóttir hevur sissað sínar starvsbrøður í Bretlandi og Niðurlondum um, at teir fáa sínar pengar*

*Mynd: Moregunblaðið*

# Eiga at velja politiska semingsnevnd



*Ingibjørg Sólrún Gísladóttir mælir stjórnini og andstøðuni til at skipa eina semingsnevnd at taka sær av Icesave-málinum* *Mynd: Vísir*

**Samgongan og andstøðan eiga at manna eina semingsnevnd, sum skal royna at finna eina loysn á Icesave-málinum**

ÍSLAND
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tað heldur fyrrverandi uttanríkisráðharrin Ingibjørg Sólrún Gísladóttir, sum eisini er fyrrverandi formaður í stjórnarflokkinum Samfylkingini. Við Fréttablaðið sigur gon, at stjórnarsamgongan og andstøðan eiga at seta seg saman at manna eina politiska semingsnevnd, sum skal leiða samráðingarnar um Icesave-málið.

Fyrrverandi uttanríkisráðharrin og floksformaðurin sigur, at tað er umráðandi, at semingsnevndin fær fulla undirtøku og fulltrú frá stjórnini og Altinginum til at gera semju við bretar og niðurlendingar um Icesave. Og tað skal gerast beinanvegin, sigur hon.

Hin møguleikin er, at fólkaatkvøðan tekur undir við samtyktini, sum Altingið gjørdi hann 30. desember, men tann loysnin fer at elva til størri spjaðing innanlands heldur enn at savna, sigur Ingibjørg Sólrún Gísladóttir, sum fór burtur úr politikki fyri einum ári síðani, tí heilsan sveik.

# Føroya Fiskimannafelag – Eina hóvligari framferð



**EYÐUN JOHANNESEN**
Næstformaður í FF

Nú tað stundar til formansvalið í Føroya Fiskimannafelag, hava nøkur lesarabrøv verið at lisið í bløðunum, frá formanni og nevndarlimi í Føroya Fiskimannafelag.

Eg havi sjálvur verið nevndarlimur í FF í yvir 20 ár, harav uml. 15 ár sum næstformaður. Eftir at hava lisið lesarabrøvini í bløðunum, kann eg ikki sita kúrrur longur. Havi annars í alla mína tíð verið loyalur mótvegis felagnum og tað til eina og hvørja tíð sitandi nevnd og formanni. Hesin loyalitetur hevur verið orsøk til, at eg ikki havi ført hesi sjónarmið fram í fjølmiðlunum fyrr enn nú. Eg havi tó ásannað, at av felag, nevnd og formanni, er felagið tað týdningarmiklasta, og hesar reglur eru skrivaðar, við tí vón, at verða til bata fyri felagið.

Í lesarabrævið hjá Fríðriki Sivertsen, sum eg taki fult undir við, har hann sigur, at fíggjarliga stýringin av felagnum, ikki er á sama høga støði, sum hon áður hevur verið. Hesum kann eg bara vera samdur í. Hóast inntøkurnar eru hækkaðar, er úrslitið lækkað munandi. T.d. eru sakføraraútreiðslurnar hækkaðar munandi, tí at tað tykist sum ein meginregla, at tann harði vegurin við sakførarum á odda, skal roynast áðrenn roynt verður við samráðingum millum partarnar.

Í útvarpinum eftir aðalfundin herfyri, segði formaðurin, at nevndin í felagnum lekur sum ein sáld, og at Reiðarafelagið visti nágreiniliga, hvat Føroya Fiskimannafelag ætlaði at gera. Hesum ákærum vil eg staðiliga afturvísa, men heldur vísa á, at okkara formaður sjálvur er farin heldur lætt um sannleikan bæði í nevnd og í fjølmiðlunum.

Hesa seinastu tíðina er tað fleiri ferðir komið fyri, at eg havi verið ósamdur við handfaringina av fleiri málum. Eg kann t.d. nevna, at málini viðvíkjandi Carlton og Artic Viking kundu verið handfarin á ein nógv skynsamari hátt. Eisini haldi eg, at tað kann vera sera óheppið at siga sáttmálan upp á hvørjum ári, uttan at hava nakað átrokandi mál at fremja. Seinast varð hetta eisini gjørt, í eini tíð, har reiðararnir vóru sperdir peningaliga, og onki komma bleiv flutt, so hetta kom sera væl við hjá reiðarunum.

At enda vil eg vóna, at felagið í framtíðini kann vísa ein hóligari framferðarhátt, har fyrst verður roynt við samráðingum, og ikki verður byrjað við at hála í táttarnar hvør á øðrum.